Starvslýsing

# KT-ráðgevi til Meginskrivstovuna

**Eitt nýskipað fulltíðarstarv í Nærverkinum innan KT-økið er leyst til setan skjótast tilber.**

**Talan er um eitt spennandi ráðgevarastarv, har uppgávurnar m.a. eru at**

- Menna og viðlíkahalda Visitatiónsskipanina og aðrar skipanir
- Vegleiða og hjálpa brúkarum okkara at nýta KT-skipanir
- Ráðgeving í samband við KT-verkætlanir og greining av KT-skipanum
- Ráðgeva leiðsluni um møguleikar og avbjóðingar innan kunningartøkni
- Ráðgeving í samband við keyp av KT-útgerð og hava ábyrgdina av sambandinum við veitarar uttanífrá
- Tryggja at øll lógarkrøv verða uppfylgd

**Førleikakrøv**

- Viðkomandi útbúgving og royndir innan KT-økið
- Akademiskan førleika

**Vit kunnu bjóða**

- Eitt áhugavert og sjálvstøðugt starv við góðum møguleikum fyri førleikamenning
- Eitt starv við nógvum avbjóðingum
- Eitt arbeiðsumhvørvi har pláss er fyri látri

**Lønar- og setanartreytir**

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Setanarstaður er Meginskrivstovan hjá Nærverkinum.

Meri fæst at vita við at venda sær til Regin Johansen, virkandi stjóra, á tlf. 304020

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til:

Nærverkið, Meginskrivstovan
Eirargarður 2, 2. hædd
Postsmoga 3037, 110 Tórshavn
Stílað: Regin Johansen, virkandi stjóra

**Umsóknarfreist** 3. nov. 2006

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumála- ráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

sansir.fo

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

# Náttarvakt Heimatænastan Suðuroy

**Almanna- og Heilsumálaráðið hevur avgjørt at seta í verk eina royndarskipan við koyrandi náttarvakt í Suðuroy.**

Vit sóknast eftir sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum ella heilsuhjálparum til eitt tíðaravmarkað starv at arbeiða í skiftandi vaktum, skjótast gjørligt.
Arbeiðið umfatar røkt og umsorgan til heimabúgvandi borgarar og til búfólkini á eldrasambýlunum í oynni.

**Førleiki**

- røktarfakligar royndir
- evni til at arbeiða sjálvstøðugt við ábyrgd
- førur fyri at loysa bráfengis uppgávur
- førur fyri at arbeiða undir skiftandi umstøðum
- góð samstarvs- og samskiftisevni
- koyrikort til persónbil

**Vit bjóða:**

- eitt starv við møguleika at menna starvsinnihaldið
- eitt spennandi arbeiðspláss við nógvum røktarfakligum uppgávum
- eitt gott arbeiðsumhvørvi

**Setan, umsókn og freist**

Starvið verður sett 1. november 2006 ella skjótast tilber.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.
Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er fyribils Heimatænastan í Suðuroy.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til økisleiðaran ella varaleiðaran á tlf. 373907.

Send eina umsókn við prógvi, autorisatión og møguligum viðmælum til

Heimatænastan Suðuroy
Stílað: Jeanna í Lágabø, økisleiðari
900 Vágur

**Umsóknarfreistin** er 27. oktober 2006.

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

sansir.fo

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

**Seinasta freist at lata broytingar inn til telefonbókina 2007 er týsdagin 6. nov. 2006**




**Í mars 2007 verður telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum. Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt.**

**Hvítu síður**

Týsdagin 7. november 2006 er seinasta freist at koma við rættingum til Hvítu síður í Telefonbókini fyri ár 2007 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 565 í Telefonbókini 2006, og skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 93 01.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari við undirstrikingum, eykaupptøkum og/ella undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er kr. 2.000,00 (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Mánadagin 6. november 2006 er seinasta freist at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**

| | | |
|---|---|---|
| (A) Standardlýsing | kr. | 900,00 |
| (B) Innramming | kr. | 1.000,00 |
| (E) Grafisk lýsing fyri mm (min. 30 mm) | kr. | 30,00 |

(sí dømi á s. 564 í Telefonbókini 2006)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 600,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.400,00.
Skrásetingar-/rættingarblað til Gulu síður er á síðu 564 í telefonbókini 2006, og skal sendast til:
Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn, ella faks 32 11 66.
**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

tel 30 30 30 www.tele.fo www.nummar.fo · info@nummar.fo - www.gulu.fo · info@gulu.fo

FØROYA TELE